VIÐMERKINGAR

### Ikki fyri hægstarætt

Hægstirættur í Belgia hevur boðað frá, at hann er ikki sinnaður at viðgera rættarmálið ímóti Marc Dutroux og fyrrverandi konu hansara.

Marc Dutroux varð í summar dømdur lívlanga fongsulsrevsing fyri at hava burturflutt seks ungar gentur, fyri at hava neyðtikið tær og fyri at hava myrt fýra teirra. Fyrrverandi kona hansara fekk 30 ára fongsul fyri at hava hjálpt honum at fremja tey óhugnaligu brotsverkini.

Tey bæði bóðu herfyri hægstarætt taka málið upp, tí tey vildu vera við, at tann nógva umrøðan í fjølmiðlunum hevði forðað fyri, at málið fekk eina rættvísa viðgerð. Men hesum er hægstirættur ikki samdur við teimum í, og tí vil hann ikki viðgera málið av nýggjum.

### Menn tjena meiri

Í Danmark vísir ein kanning, at í meðal forvunnu danskir menn 80.000 krónur meiri enn kvinnurnar í fjør. Haraftur ímóti vaks meðallønin hjá kvinnunum munandi meiri enn lønin hjá monnunum.

Kanningin avdúkar, at 34.624 danir forvunnu meiri enn eina millión krónur í fjør, men av hesum vóru bara 3.934 kvinnur ella lítið meiri enn tíggju prosent. Heldur frægari er tað, um hugt verður at teimum 213, sum forvunnu meiri enn 10 milliónir krónur í fjør. Av teimum vóru 28 kvinnur, og tað svarar til trettan prosent.

Kanningin vísir, at av teimum, sum forvinna ímillum 100.000 og 200.000 krónur um árið, eru næstan 60 prosent kvinnur. erður hugt at teimum, sum forvinna ímillum 300.000 og eina millión krónur um árið, eru 65 prosent menn.

Annars vísir kanningin, at danskir menn forvunnu í meðal 289.000 krónur í 2003, meðan lønin hjá kvinnunum var 211.000 krónur í meðal. Meðallønin hjá monnunum var 1,2 prosent størri enn árið fyri, men hjá kvinnunum var hon næstan trý prosent størri.

### Fær nýtt ST-arbeiði

Norski diplomaturin Terje Rød Larsen er tilnevndur varaaðalskrivari í ST við Libanon sum serligum ábyrgdarøki.

Terje Rød Larsen hevur seinastu fimm árini verið serligur ST-sendimaður í Miðeystri, har stríðið ímillum ísraelsmenn og palestinar hevur tikið tað mesta av arbeiðstíð hansara. Nú hevur Kofi Annan so gjørt av at flyta hann til New York. Umframt varaaðalskrivarstarvið skal hann eisini virka sum leiðari á International Peace Academy, ið er ein stovnur, sum hevur tætt tilknýti til ST, og sum skal forða fyri politiskum ósemjum.

Kona Terje Rød Larsen, Mona Juul, er norskur sendiharri í Ísrael, men á nýggjárinum tekur hon við sum sendiharri og varaformaður í norsku ST-sendinevndini.

### Arnold aftur á løriftið

Arnold Schwarzenegger ætlar sær ikki at leggja filmslívið á hillina, hóast hann nú er guvernørur í Kalifornia.

Í vikuni visti blaðið USA Today at siga, at Schwarzenegger hevur játtað at spæla við í einum filmi, sum vinmaður hansara Tom Arnold skal gera. Filmurin, sum hevur fingið heitið "The Kid and I", snýr seg um ein ungan drong, sum ætlar sær at sleppa at spæla í sokallaðum "action-filmum". Sum skilst er filmurin av tí stuttliga slagnum, men enn er ikki greitt, hvør leikluturin hjá Schwarzenegger verður, men hann verður so ikki høvuðsleikari, skrivar USA Today.

Arnold Schwarzenegger hevur fyrr roynt seg sum stuttligan filmsleikara, uttan at tað tó gekk serliga væl.

# Tey neyðstøddu í Darfur kunnu missa hjálpina

**Ágangurin ímóti flóttafólkunum í sudanska landspartinum Darfur heldur fram, og nú er vandi fyri, at hjálparfólkini noyðast at gevast**

NEYÐHJÁLP
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Norska sjúkrasystirin Rakel Ludviksen hjálpir einum barni í Darfur*
*Mynd: Jean-Pierre Amigo (Læknar Uttan Landamark)*

Í løtuni eru umleið 7.000 hjálparfólk í Darfur. Tey hava nóg mikið av mati, heilivági og aðrari útgerð til at hjálpa teimum neyðstøddu flóttafólkunum, men áhaldandi álop gera, at tey verða kanska noydd at gevast við hjálpararbeiðinum.

Felagsskapurin Læknar Uttan Landamark hevur umleið 200 læknar og onnur úr fleiri londum í Darfur, men tey arbeiða undir sera ótryggum viðurskiftum. Tað hendir meiri enn so, at tey somu flóttafólkini verða álopin tvær ferðir um vikuna, so tey noyðast at flýggja. Tað ger, at tað er sera trupult hjá hjálparfólkunum at veita teimum ta neyðugu hjálpina, sigur felagsskapurin.

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch gevur sudansku stjórnini skyldina av, at ágangurin ímóti flóttafólkunum stendur við. HRW sigur, at stjórnin styðjar tey arabisku Janjaweed-álopsliðini, og at stjórnarhermenn ofta taka lut í álopunum.

- Vit hava dømi um, at stjórnarhermenn hava tikið lut í hópmorðum, sett eld á bygdir og noytt fólk at flýggja frá húsi og heimi, sigur Human Rights Watch.

# Veðurlagsbroytingar raka Afrika meint

**Hóast Afrika dálkar minst, eru avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum størri har enn í nøkrum øðrum heimsparti**

VEÐURLAG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í komandi árum mugu fólk í Afrika fyrireika seg til meiri turk og fleiri vatnflóðir enn higartil. Avleiðingarnar av hesum verða, at partar av djóralívinum og plantulívinum fara at hvørva, tað verður uppaftur truplari at fáa nóg mikið av mati og vatni enn nú, og flóttafólkini verða uppaftur fleiri í tali.

Tað er niðurstøðan í einari nýggjari frágreiðing, sum náttúruifelagsskapurin World Wildlife Foundation hevur skrivað um veðurlagsbroytingar í Afrika og avleiðingarnar av teimum.

– Veðurlagið er í Afrika er sermerkt, og soleiðis hevur tað altíð verið. Men Afrika er eisini tann heimsparturin, har fólk hava ógvuliga avmarkaðar møguleikar at verja seg ímóti broytingum, samstundis sum náttúrutilfeingið er avgerandi fyri, at fólk yvirhøvur kunnu búleikast har, sigur aðalskrivarin í World Wildlife Foundation, Rasmus Hansson, við Dagsavisen.

### Nógv broytt

Í frágreiðingini hjá felagsskapinum stendur, at tey seinastu hundrað árini er meðalhitin í Afrika vaksin 0,7 stig, og sjálvt umn tað ikki ljóðar av nógvum, hevur broytingin havt stórar avleiðingar. Ein broyting er at síggja á fjallinum Kilimanjaro, sum er tað hægsta í Afrika. Av ísinum, sum lá ovast á fjallinum fyri 90 árum síðani, eru bara átta prosent eftir. Ein onnur broyting er, at nú regnar tað 30 prosent minni í skógarøkinum sunnan fyri Sahara enn fyri 30 árum síðani, og í sama tíðarskeiði eru liviumstøðurnar hjá plantulívinum í hesum sama økinum versnað 25 prosent. Tann veksandi hitin hevur samstundis gjørt, at sjúkan malaria er vorðin ein altsamt størri og størri trupulleiki í londum sum Rwanda og Tanzania.

– Fólk í Afrika kenna longu sviðan av veðurlagsbroytingunum. Fer eftir ferð hava vit sæð, at veðrið setur met av einum ella øðrum slagi, og hyggja vit at hagtølunum, síggja vit, at næstan øll veðurmetini eru frá áttiti- og nítiárunum. Tað er eingin ivi um, at hetta kemst av broytingum í veðurlagnum, sigur Rasmus Hansson.

Kyoto-sáttmálin, sum skal forða ella tálma veðurlagsbroytingunum, kemur í gildi tann 16. februar næsta ár. Hesa vikuna sita umleið 6.000 politikarar, embætismenn og onnur á fundi í argentinska høvuðsstaðnum Buenos Aires og tosa um sáttmálan, og hvussu hann skal fáast at virka. Samstundis er semja um, at sátmálin er ikki nóg mikið til at forða broytingunum í veðurlagnum kring heimin. Tí tosa luttakararnir í Buenos Aires eisini um, hvat skal gerast, eftir at tað fyrsta tíðarskeiðið hjá sáttmálanum fer úr gildi í 2012, og í tí sambandi verður roynt at fáa uppaftur fleiri lond at binda seg til at avmarka dálkingina, sum elvir til broytingarnar í veðurlagnum.